LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingartreytir fyri ókeypis lýsingar:
Privatar lýsingar í mesta lagi 40 orð, bert ein lutur í hvørjari lýsing, hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Frá fyritøkum og virkjum.
Lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur«
Bill. merktar.

Minsta gjald fyri lýsingar:
70 kr. við MVG hvørja ferð.

Akfør

TOYOTA HIACE
Árgang 2000, 2,4 diesel. Koyrt 120.000 km. Hevur krók og takboylar. Til sølu fyri 64.000 kr + mvg.
Tlf. 215877

SUZUKI SWIFT
bíliga til sølu.
Tlf. 332884/283904

PEUGEOT PARTNER 1.9 DIESEL
árg. 9/2001 til sølu. Setur aftan og píkadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 447469

YNSKIST
Ein eldri Mitsubishi lastbilur 3500 kg. Hevur tú ein, so vinarliga ring
tlf. 332203/221866

TOYOTA TIL SØLU
Toyota Corolla 1.3, er í góðum standi, hevur sóltak, vel, er nýlakeraður, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 220004

CITROEN JUMPER
2300 diesel, árg. 98, til sølu fyri 40.000,-
Tlf. 373148 ella +45 32951616

TIL SØLU
Ein Toyota Carina arg 1990 til sølu. Hándbremsan skal skiftast,men annars í góðum standi. kr. 8500
594710

NYGGJUR:, FORD FIESTA TREND 1,6 TIL SØLU
Ger kubbi! 3 mdr gamal koyrt 4900 km. nyggj vetra og summardekk. Svartur. Ny prís 189.000. Nú bert!! 165.000 kr.
Ring 229883

MERCEDES 190
Ein Mercedes 190 til sølu, er í góðum standi, vð í keypinum eru 4 píkadekk á felgum, søluprísurin er 40.000 kr. Hevur tú áhuga fyri bilinum, so ring til
443096

TOYOTA CARINA 2
árg. 90, til sølu. Bilurin er sýnaður í apríl 07. Prísuppskot 18.000 kr.
Tlf. 220522

Alt til akfør

SUMMARDEKK
Lítið brúkt Michelin Energy dekk á felgum, ið passa til Peugeot 406 til sølu fyri einans 2.200 kr.
Tlf. 214166

PÍKADEKK Á FELGUM
Píkadekk á orginalfelgum til Audi A4
551092

PÍKADEKK Á FELGUM
Píkadekk á orginalfelgum til Audi A6
551092

DEKK TIL SØLU
Dekk til sølu. 3stk. 165 R 13, píkadekk uttan felgu.2 stk. 155/80 R 13, píkadekk við felgum.2 stk. 165/70 R 13, heilársdekk við felgum.100 kr. Stk. Felgurnar hava hoyrt til ein Ford Fiesta.
Tlf. 260092

Arbeiði

FITT KONA ELLA OMMA
Vit eru tvey fitt børn á Skálafjørðinum, drongur/genta 4/2 ár, sum sóknast eftir einari fittari konu/ommu at ansa eftir okkum frá 2. januar 2008 og nakrar mánaðar fram. Vit gleða okkum at hoyra frá tær.
Tlf 254250 ella 504970

Barnaútgerð

REIGGJA
Grøn pinkubarnareiggja. Óbrúkt.
510101

AMMUPÚTA
Gul, mynstrut ammupúta í góðum standi.
510101

LØBEHJUL
Blátt løbehjul við trimum hjólum og reyðari kurv.
510101

KOMBIVOGNUR
SCANDIA. Myrkagrønur. Lufthjól. Handtakið kann justerast í hædd.
510101

BABYLIFT
Blá BRIO babylift.
510101

BARNAVOGNUR
Bláur BRIO. Í góðum standi. Koyriseli, regnslag, putlitaska, babylift.
510101

PUTLIBORÐ
Stórt putliborð við skuffum, hillum og skápi. Kirsuberjatræ.
510101

BRITAX AUTOSTÓLUR 0-13KG
Bláur britax autostólur til sølu fyri 300 kr. Stólurin er vælhildin.
Ring 256823

SIMO KOMBIVOGNUR TIL SØLU!
Er nakar sum er áhugaður í einum simo kombivogni fyri 1000 kr. Við fylgir: Lyft, madrassa, seðlar, koyriposi, flugunet, regnslag, puslitaska.
Ring 256823

YNSKIST EMMALJUNGA STÓLUR
emmaljunga stólur ynskist.
Ring/sms 274472

Bátaútgerð

HVALVÍKS JOLLA TIL SØLU
fáa meira at vita á www.sel.fo/Showitem.aspx?Id=8189

BÁTAMOTORUR
Ein volvo penta TMD 31 100 Hk við mekaniskum geari
562092 / 316502

FISKILOYVI
Bólkur 5B til sølu.
Tlf. 506338

BÁTUR TIL SØLU
Selfa kystsjark. Hevur fiskiloyvi 5B, línuspæl, 8 nýggjar línur, 2 nýggjar elektroniskar snellur v.m. og alla vanliga nautiska útgerð.
Tlf.: 510757

MOTORUR
Mercedes Typa OM402.Motorurin er 230 HK hevur einki gear og ongan kølara.
220512

BÁTAMOTORUR
Ford bátamotorur 125 HK.
220512

Bingo

JÓLABINGO
Gott jólabingo verður í Pálsstovu hóskvøldið 20. desember kl. 19. At vinna: Dunnur, steikir, karamellur o.m.a. Á lutaseðli: m.a. balur ufllar av mati.
Stuðulsfelagið hjá AB

GOTT JÓLABINGO
verður í Pállstovu mánakvøldið tann 17/12 kl. 19. At vinna dunnir, karamellir, før. ræst kjøt, gás og jólakurv. 6. og 12. spæl 500 kr. Á lutaseðli 2 ferð 500 kr. og 2 Fø krov og nógvir góðir vinningar. Koyring heim aftaná.
Spastikarafelagið

BINGO Í FELAGSLONINI Í FUGLAFIRÐI
leygardagin 22. desember er avlýst. Men hóskvøldið 27. des. er aftur bingo. Vit hava bingo annanhvønn leygardag og annaðhvørt hóskvøld. Øll eru vælkomin.
Eldrafelagið Borgin

Burturm. /funnið

TÚ, SUM HEVUR FUNNIÐ
ein lítlan bláan SMS posa á pengaautomatini við tógvhandilin í SMS, tað var eitt pe-spæl, eg gloymdi tað eftir.
Tlf. 257390

Býli í Føroyum

ÍBÚÐ Í HAVN
Uml. 60 fermetrar, stova og køkur í einum, soviverilsi, kamar og wc/bað við vaskimaskinu og turkitumblu. Nýliga gjørd av nýggjum.
Sp/f Íbúð, tlf. 211192

TIL LEIGU/SØLU
Hús í Sørvági til leigu ella sølu.
Tlf. 332884/283904

HJÁLPI!!!!
Eg og sjeikurin leita eftir einari íbúð, skjótast gjørligt, í Havn, ella so tætt uppá sum møguligt. Eg havi fast arbeiði fulla tíð, hann gongur í skúla og arbeiðir aftaná skúlatíð. Vit eru bæði í 20'inum. Vit fara væl um, eru friðalig, gjalda til tíðina, roykja ikki inni.Helst ikki meira enn 4000-5500 kr um mánaðin.Um tú hevur eina íbúð til okkum, vilt tú so ikki ringja til mín á
tlf: 587424

KAMAR
Ung genta, søki kamar í eysturbýnum. Hvørki royki ella drekki og fari væl um. Gjaldi til tídina.
Vinarliga ring 268239

ÍBÚÐ Í KLAKSVIK YNSKIST
Er tað nakar sum kann hjálpa okkum. Vit eru eitt par við einum barni sum mangla eitt stað at búgva eftir jól. Er tað nakar sum kann hjálpa okkum? Vinarliga ring 256823 eftir kl 18. Vit hava bæði fast starv.
Tlf. 256823

ÌBÚÐ YNSKIST.
Vit eru eitt par við einum soni, sum ynskir eina íbúð til leigu um ca 3 til 4 mánaðir, vit roykja ikki og fara væl um og gjalda tl tíðina. Leigan skal ikki verða meiri enn 5000.-um mán. Tað skal helst verða í Tórshavn, síðan vit bæði arbeiða har.
Vinarliga ring 607706

LEJLIGHED ØNSKES
Lejlighed i Eystoroy ønskes til max. 3000 om måneden, helst i Gøtu-runavík og omegn
442169, 509323

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par, sum leita eftir íbúð í Tórshavn, Hoyvík ella á Argjum. Max. 4.000,-
Tlf. 237154

TIL LEIGU
Stór stova og kamar til leigu, við felags køki, wc, brúsu og vaskirúmi til friðarligt fólk, sum ikki roykja og ikki drekka.
Tlf. 582497

KVINNA VIÐ 2 BØRNUM
søkir íbúð í Havn. Royki og drekki ikki, fari væl um. Vinarliga ring
tlf. 266912

HÚS Í MIÐBÝNUM TIL LEIGU – VÆL HÓSKANDI TIL FAMILJU ELLA SKRIVSTOVUVIRKSEMI!
Hugnalig og væl hildin sethús í miðbýnum til leigu frá febr. 2008. Húsini eru tils. 170 m2 og eru innrættaði í tveimum hæddum (trý kømur á loftinum). Tvær altanir í ovaru hædd við góðum útsýni yvir Havnarvág. Húsið liggur væl fyri í yndisligum umhvørvi framvið Rættará og er vælegnað til eina familju at búgva í og eisini skrivstovuvirksemi!Um tú hevur áhuga ring
+45 61656814 ella skriva til husleiga@gmail.com!

KUNNU TIT HJÁLPA !
Mamma og barn søkja eftir búðstaði í Havnarumráði. Má vera ein góð íbúð, helst lág leiga. Vinarligast ringi á
tlf. 210913. Takk!

HJÁLP
ungt par í 20'inum leitar eftir íbúð í havn, á argjum ella í hoyvík. vit fara væl um og gjalda rættstundis. max. 5.500 kr við øllum vinarliga ring á
tlf: 589676

Býli uttanlands

ÍBÚD TIL LEIGU Í KEYPMANNAHAVN
2 vær. íbúd á Amager til leigu frá hálvan des. til 1. feb.
Tlf. 28 46 62 12 ella 22 12 25

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN TIL LEIGU Á JÓLUM
Íbúðin liggur á Nørrubrúgv (beint við sjógvarnar). Soviplás til 4 persónar (2 kømur). Hevur allar hentleikar. Sera barnavinarlig. Stóran innilokaðan garð. 5 min. til gongu til Metro. Til leigu 19/12-2/1. 300 krónur per nátt. Vinarliga ring
+45 35399363/26920003
ella skriv
beinta1980@hotmail.com

Bøkur

HF BØKUR OG AÐRAR
Bíliga til sølu: Worlds of fantasy. Stjørnuskot undir Varða. Litteraturens veje. De uanstændige. Dead poets society. The crucible. Sandhedens hævn. Eystur, vestur. Lær teg enskt.
Tlf.: 593344

Dansur

FØROYSKUR DANSUR Í TØKUM LÆTT
2. jólakvøld verður dansað í Skansastovu, Djóni í Geilsgøta 1. Øll eru vælkomin. Byrjað verður kl. 22.
Tøkum Lætt

Dýr

3 FITTIR HUNDAHVØLPAR
undan lítlum hundaslag, leita eftir einum góðum heimi.
Tlf. 266329/441483

4 ELSKULIGIR KETTLINGAR.
Tríggir svartir og ein gulur við hvítum labbum og hvítum halasnippi. Kettlingarnir eru klárir at lata einum djóravini. Mamman er ein stór hálv Norsk Skógarketta og allir kettlinarnir hava okkurt eftir henni. Mamman er eisini sjáldsama rólig og dámar væl børn.
Telefon 256327 - 256027

HUNDAHVØLPAR
Fittir, 8 vikur gamlir hundahvølpar, ið vera til smáar hundar, verða lætnir til djóravinir.
Telefon 441484/278668/771019

Fundir

HAGAFUNDUR
Lýst verður til hagafund fyri Strandahaga, Klaksvík, í skúlanum á Ziskatrød leygardagin 29. des. 2007 kl. 20. Fundarskrá:
1. Val av hagastýri.
2. Roknskapurin.
3. Ymiskt.

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Alt til akfør	❑ Amboð
❑ Arbeiði	❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð
❑ Bátaútgerð	❑ Bingo	❑ Brævaskifti
❑ Burturm./funnið	❑ Býli	❑ Býli uttanlands
❑ Bøkur	❑ Dansur	❑ Dýr
❑ Fartelefonir	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súkklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl 12.00 dagin fyri útgávudagin, t.v.s. at lýsingin til mánadagsblaðið skal vera okkum í hendi fríggjadag á middegi.
Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.
Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki